## HB-venjarin uppsagdur

Føroyameistararnir eru í løtuni átta stig aftan fyri oddaliðini, og tað tykist hava kostað venjaranum sessin. Tað hevur ikki borið okkum til at fáa váttað boðini um uppsøgnina frá leiðsluni í HB, men tað skuldi tó verið púrasta vist. 2-0 tapið fyri B36 í gjárkvøldið gjørdist eftir øllum at døma seinasti dysturin, har venjarin hjá HB æt Krzyzstof Popczynski. Meistararnir høvdu við einum styrktum liði avgjørdar ætlanir um at endurvinna gullið í ár, men óstøðug úrslit hava higartil sent teir átta stig aftur um NSÍ. Og vinna runavíkingarnir sín dyst um vikuskiftið, verður munurin ellivu stig. Ivaleyst er tað hetta, sum ikki hevur smakkað HB-leiðsluni. Hvørki Birgir Enghamar, formaður í HB, ella Steinfinnur Mittelstein, stjóri í P/F Havnar Fótbóltur, hava verið at hitt í morgun.

Jákup

# B36 var klassan omanfyri

HB

B36

**Frá byrjan til enda vísti B36, at teir vóru betri enn HB henda dystin. Teir høvdu ein greiðan yvirluta í spælinum, og vóru tað eisini teir, ið struku avstað við teimum trimum týdningarmiklu stigunum**

FÓTBÓLTUR
*Pætur Albinus*
*patur@sosialurin.fo*



*HB hevði trupult við at finna skipaða spælið fram, meðan B36 hinvegin í løtum spældi sera væl*
*Mynd: Jens Kr. Vang*

Lagt var upp til ein sera tættan og spennandi dyst, tá ið føroyameistararnir møttu steypavinnarunum í gjárkvøldið. Grannauppgerðin fekk ongantíð eyðkenda javna spælið, tí B36 sat á nógv tí mesta spælinum, meðan HB hevði trupult við at finna seg sjálvar.

### Leiklig yvirvág

Fyrstu fimm minuttirnir av dystinum góvu okkum okkum ábendingar um, at B36 ætlaði sær øll trý stigini. Teir høvdu bóltin nógv, meðan HB-leikararnir skuldu finna hvønn annan. Sum minuttirnir gingu høvdu teir stríputtu tó trupult við at finna stevið, og lótu teir fyri tað mesta B36 koyra bóltin runt. Við góðum bóltførleikaleikarum sum Hanusi Thorleifsson og Heina í Skorini mitt á miðjuni, høvdu teir hvítu ikki stórar trupulleikar at fáa bóltin fluttan niðan á vøllin. Fyrstu 25 minuttirnir megnaði B36 tó ikki at spæla seg so nær málinum, at nakar stórvegis málmøguleiki spurdist burturúr.

### Løn fyri stríðið

Móti endanum av fyrra hálvleiki tóktist málið hjá B36 at vera greitt. Teir vildu hava eina hálvleiksleiðslu, og hetta lá í luftini at teir skuldu fáa. Høgu leikferðini hildu teir, og stríðsviljin var avgjørt til staðar.

Og fimm minuttir fyri steðgin bragdaði hjá B36. Mikkjal Thomassen vann bóltin av Tór-Ingar Akselsen í vinstru síðu. Mikkjal tók nøkur fá fet fram eftir vøllinum, áðrenn hann sendi eitt innlegg til Sylla, sum stútaði bóltin í netið 1-0.

B36 royndi at trýsta fyri at økja um hálvleiksleiðsluna, men sama støðan helt sær til hálvleiks.

### Jøvn løta

Tað tóktist sum HB-leikararnir høvdu fingið nøkur álvarsorð í steðginum frá tí núfyrrverandi HB-venjaranum, Krzyzstof Popczynski, tí fyrstu løtuna eftir steðgin var liðið nógv meira í dystinum. Eisini kundi hetta takkast at Jákup á Borg nú var komin inn, og var ein sera arbeiðslig megi á høgra kanti hjá HB. Fyri fyrstu ferð vórðu gjøgnumspæld álop framd, og nakrar royndir á mál vóru nú at finna.

Men at liðið nú hevði otað seg longri fram á vøllin, bar í sær, at B36 fekk meira pláss at leika á fram eftir vøllinum.

Og tá ið ein góður tími var farin, mundi hetta kostað hjá føroyameistarunum, men teir sluppu við skrekkinum. Sylla reiv seg leysan av HB-verjuni, og fekk ein sokallaðan fríloypara móti málinum. Skotið tók tó innnaru síðu av stongini, og endaði í føvninginum hjá Tróndi Vathnhamar.

### B36 aftur á dystin

Tá ið ein tími var leiktur settist B36 aftur á spælið. Nógvar flytingar fóru fram á nógva plássinum, sum teir fingu at leika á. HB-liðið lá langt frammi á vøllinum, og tað sást, at nú mátti bera ella bresta.

Í 64. minutti fekk B36 hornaspark. Heini í Skorini sendi tað væl inn fyri, og HB-verjan fekk ikki ruddað burtur. Bólturin var leysur inni í feltinum, og fyrstur á bóltinum var Fróði Benjaminsen, sum við vinstra beini stýrdi bóltin í netið til 2-0.

Luftin tóktist nú av álvara at vera farin úr HB, sum henda dagin hevði trupult við at vinna sær bóltin.

Móti endanum av dystinum tóktist menn at gerast heitir, og í einari støðu komu leikararnir upp at táttast. Ein støða, ið kostaði hjálparvenjaranum hjá HB, Albert Ellefsen, reyða kortið.

### Fullførdu avrikið

Seinasta korterið spáddist eingin ivi um betra liðið. B36 sat so at siga á øllum spælinum, og vónloysi kundi síggjast á HB-liðnum. Móti endanum av dystinum kundi líkt til, at HB fekk tillutað brotsspark. Men dagsins dómari, Petur Reinert, sum stóð væl fyri í hesi støðu, valdi at geva Chrisian Høgna Jacobsen gula kortið fyri sjónleik.

Vanliga leiktíðin rann út, og í teimum fýra minuttunum, ið lagdir vórðu afturat, kom heldur einki mál.

Við sigrinum vann B36 sær fyribils oddasessin í Formuladeildini, men av tí at teir hava leikt ein dyst fleiri enn NSÍ, so tryggjaði B36 heldur eitt týdningarmikið fet í veruliga oddastríðnum.

Hjá HB gjørdist ilt verri, og mátti nú síggja oddin sigla enn longri frá sær.

## - Har fór meistaraheitið

Jákup á Borg, liðformaður hjá HB, heldur, at meistaraheitið er rokið.

– Tað er sum eg segði við tykkum undan dystinum. Taptu vit í dag, so reyk meistaraheitið, sigur Jákup á Borg, sum vegna smáskaða ikki leikti fyrra hálvleik av dystinum.

Jákup heldur orsøkina til tapið vera einfalda.

– Teir vóru nógv betur tendraðir enn vit. Einki koyrdi hjá okkum, og alt ov langt var millum keturnar hjá okkum, sigur Jákup, men vísur tó á, at teir ikki leggja seg at gráta. Løgmanssteypið og Champions League er næst á skránni.

- Vit raktu dagin

Spurdur, um hann helt teir rætt og slætt vóru betri enn HB, svarar Hanus Thorleifsson hjá B36 soleiðis:

- Eg haldi tað var ein blandingur av tí og at vit raktu dagin.

Hann sigur B36 hevur góðar vónir víðari í kappingini.

- Sjálvandi trúgva vit uppá meistaraheitið. Hýrurin er sera góður í hópinum, og nú fara vit at royna at vinna á GÍ sunnudagin, sigur Hanus Thorleifsson, og vísur á, at tveir harðir dystir í seinastu vikuna kann koma at merkjast sunnudagin.